## Norðurkorea vil ikki samráðast

Myndugleikarnir í Norðurkorea eru sera misnøgdir við, at ST hevur fordømt landsins seinastu rakettroynd. Almenna tíðindastovan KCNA skrivar við uttanríkisráðnum sum keldu, at Norðurkorea hevur gjørt av at taka seg burtur úr samráðingunum um landsins kjarnorkuætlanir. Sagt verður, at tað er nyttuleyst at halda fram við samráðingunum, og at landið tí umhugsar at taka plutoniumframleiðsluna uppaftur. ST-trygdarráðið sigur í sínari samtykt, sum var einmælt, at tann seinasta norðurkoreanska rakettroyndin var í stríð við ST-forboð ímóti slíkum royndum.



## Eftirskjálvti í Italia

Ein harður eftirskjálvti var í morgun í Miðitalia. Skjálvtin var í umráðnum við býin L´Aquila, har ein harður jarðskjálvti kravdi næstan 300 mannalív fyri einari viku síðani. Enn er ógreitt, um eftirskjálvtin gjørdi nakran skaða, men hann var so mikið harður, at ristingarnar merktust væl í Rom. Amerikanski jarðfrøðistovnurin sigur, at skjálvtin var 5,0 á Richterstiganum. Italsku jarðfrøðingarnir siga, at tað hava verið umleið 10.000 eftirskjálvtar síðani tann harða jarðskjálvtan. Teir flestu hava tó verið sera veikir.

# Vistu av ongum og fing

**Tað kostaði tveimum hetlendskum ísfiskatrolarum dýrt, at skipararnir ikki vistu, at Fiskiveiðieftirlitið herfyri stongdi eina leið á Munkagrunninum eftir kunngerðini um bráðfeingis veiðibann**

FISKIVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnunáttina kom Tjaldrið á Havnina við trolarunum, Venture og Mizpah, sum um fylgissveinaeftirlitið hjá Fiskiveiðieftirlitinum vórðu sæddir á stongdari leið á Munkagrunninum.

Skipararnir, sum áður hava verið í føroyskum sjógvi, vistu ikki, at leiðin, teir royndu á, varð stongd hin 6. apríl. Teir vistu tískil av ongum og vóru í góðari trúgv, tá Tjaldrið kom á leiðina og bað teir fylgja við til lands.

### Kostaði dýrt

At teir ikki vistu um lýsta bráðfeingis veiðibannið, kom at kosta teimum dýrt, slakar 400.000 krónur tilsamans.

Skipararnir tóku í Føroya Rætti við sektaruppskoti, og nú reiðaríini hava reist trygd fyri samlaðu upphæddini upp á slakar 400.000 krónur, eru skipini farin útaftur.

Teir báðir skipararnir á Venture og Mizpah fingu hvør sínar 100.000 krónur í bót, umframt at teir noyddust at reisa trygd fyri ávikavist 97.000 og 91.000 krónum fyri veiði, reiðskapi og sakarmálskostnaði.

Skipararnir søgdu, at teir vóru ikki kunnaðir um, at leiðin varð stongd, og teir gjørdu heldur einki fyri at krógva seg fyri myndugleikunum.

### Vóru kunnaðir

Á Fiskiveiðieftirlitinum siga tey, at skotsku myndugleikarnir vóru kunnaðir um veiðibannið, eins og veiðibann altíð verður lýst á heimasíðuni hjá stovninum.

- Tað er hent nakrar ferðir í vár, at bráðfeingis veiðibann er lýst í 14 dagar í senn eftir kunngerðini um smáfisk. Skipanin er hon, at tá ov nógvur smáfiskur er uppi í veiðini hjá skipunum, og veiðibann verður lýst, verður bannið lýst seks tímar, áðrenn tað tekur við.

Spurdur, hvørjar møguleikar útlendskir skiparar hava at vita um slík bráfeingisbann, sigur Fiskiveiðieftirlitið, at teir í fyrsta lagi kunnu venda sær til fiskiveiðimyndugleikarnar í heimlandinum.

- Onkur skipari vendir sær eisini beinleiðis til vaktarskipini hjá okkum, eins og onkur vendir sær til Fiskiveiðieftirlitið. At skiparar vilja tryggja seg við at spyrja seg fyri, er nakað, sum hendir av og á.

Á Fiskiveiðieftirlitinum siga tey, at slík veiðibann eisini verða lýst á heimasíðuni við enskum teksti, men leitiskipanin á heimasíðuni er ikki á enskum.

- Hetta er ivaleyst nakað, sum vit kunnu gera nakað við og gera betri, verður lagt aftrat.

### Høvdu veiðiloyvi

Bæði Venture og Mizpah høvdu annars loyvi at fiska í føroyskum sjógvi eftir





*Hetlendsku skipararnir umborð á ísfiskatrolarunum Venture og Mizpah vistu av ongum, tá Tjaldrið kom fram á teir á Munkagrunninum og bað teir fylgja við til lands, tí teir royndu á stongdari leið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*